VIÐMERKINGAR

## Barnsburðarstuðul til lesandi

JOHN JOHANNESSEN
løgtingsmaður fyri Javnaðarflokkin
john@john.fo

*Eftir kravi frá Javnaðarflokkinum eydnaðist at fáa niðurfelt í samgonguskjalið, at skipanin við lestrarstuðuli skuldi endurskoðast, við tí endamáli at hækka stuðulin til forsyrgjarar umframt at geva lesandi møguleika at fara í barnsburðarfarloyvi við fullum lestrarstuðuli*

Sambært upplýsingum frá Stuðulsstovninum er tað skjótt og lætt at broyta lestrarstuðulsskipanina til fyrimuns fyri forsyrgjarar, uttan at hetta gerst ein stór útreiðsla fyri landsskassan. Tilsamans góðar 3 milliónir, ella har á leið, kostar tað at geva forsyrgjarum hægri lestrarstuðul og møguleika fyri barnsburðarfarloyvi.

Hendan peningin hava vit ráð at nýta, tí betri møguleikar fyri útbúgving og menning av føroyska ungdóminum er uttan iva besta íløgan, ið samfelagið kann gera. Og íløgan er alneyðug. Tað eru kappingin við heimssamfelagið og úrslitið av PISA kanningini bestu dømir um.

Tað mundi eydnast at fingið broytingina samtykta áðrenn løgtingið fór til hús, men beint fyri, at málið skuldi leggjast fram, komu forðingar í vegin frá Fíggjarmálaráðnum. Tískil er avtala fingin í lag við landsstýrismannin í mentamálum, um at hann skal brúka summarið til at koma við uppskoti til eina broyting í lestrarstuðulinum, ið eisini landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kann góðtaka.

Semja er í samgonguni, um at landsstýrismaðurin skal koma við sínum uppskoti skjótt eftir, at løgtingið er komið saman aftur á ólavsøku. Semja er eisini um, at høvuðsbroytingin í uppskotinum skal vera betri møguleikar hjá forsyrgjarum at nema sær útbúgving. Hesaferð rokni eg eisini við, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fer at taka væl ímóti uppskotinum...

## Hví ikki gleðast við teimum



JENIS AV RANA
løgtingsmaður

*- ein viðmerking til eina løgna sending í einum løgnum sjónvarpi*

Eftir at hava sæð sendingina EKKÓ sunnukvøldið, sæð hesi fittu, glaðu, strálandi ungu við so ymiskum bakgrundum, sat eg eftir við spurninginum- hví gjørdi kringvarpið ikki eina sólskinssøgu burturúr hesum tilfari?

Hví valdi sjónvarpið at sáa iva, at vænta nakað ringt, illteinkja og insinuera, hví loyva presti at speireka, hví og aftur hví?

Hví ikki gleðast við hesum, sum hava funnið Hann, sum tey elska framum alt annað. Hann, sum tey hava valt at liva saman við, at tilbiðja, at seta alt álit sítt á og í takksemi at liva fyri?

Gleði, friðsæla og trygg-leiki skein av teimum, hví ikki focusera uppá tað, finna út av hvussu tað ber til- og annars bara gleðast við teimum?

Bygdi sendingin á dømir um ung, ið vóru vorðin vónsvikin og kanska komin illa fyri av tí lívi og lívshátti hesi hava valt? Nei als ikki.

Tey vóru glað og høvdu sett álit sítt á nakað, ið heldur, tá á stendur. Hví er tað, sambart almenna sjónvarpinum, illgrunasamt?

Hesi liggja ikki hjálparleys og rúsaði úti á náttargøtunum!

Tú finnur tey neyvan í fangaklivum ella sundursorlaði og neyðtikin av heimsins rúsi út á smáu tímar náttarinnar.

Tey fylla neyvan skaðastovur okkara teir tímarnar, tá mong foreldur hjálparleys liggja í andvekri og bíða eftir sínum ungu.

Tey gleðast uttan rúsandi evni, tey vakna til ein nýggjan dag uttan timburmenn, tey hava fantastiskar ætlanir um at liva fyri Harra og meistara sín. Tey royna at vinna onnur fyri Frelsaran, tey gera ongum nakað ilt.

Hvat hava tey gjørt sjónvarpi okkara?

Hví gleðist sjónvarpsmanningin ikki saman við teimum?

p.s. annars mátti onkur hvalbingur verið so frægur at fari yvir til prest við einari bíbliu og víst honum, hvat orð Guds sigur um umvending- og um at geva.

VIÐMERKINGAR

# Hvørki fiskiríkidømi ella oljuríkidømi skulu gevast burtur

KAJ LEO JOHANNESEN
Sambandsflokkurin



Formaður Fólkafloksins á tingi, Jørgen Niclasen, sigur í samrøðu við Sosialin, at hann orkar ikki tankan um føroyskan limaskap í ES. Hann byggir hesa støðu sína á tær órímiligu treytirnar, sum hann roknar við, at ES fer at seta Føroyum.

Jørgen Niclasen, løgtingsmaður, sigur í samrøðu við Sosialin, at verða Føroyar limur í ES, so fáa vit eina kvotuskipan, har fiskivinnan fer niður í helvt og har okkara heimasjógvur fer at liggja opin fyri skipum úr ES londum. Eisini sigur hann, at okkara oljuinntøkur fara at streyma niður til Brússel.

Um hesar gitingarnar eru rættar, er einki at siga til, at Jørgen hevur ta støðu, sum hann hevur. Tí sjálvsagt skulu vit hvørki geva okkara fiskiríkidømi, og ei heldur eitt møguligt oljuríkidømi burtur. So langt eru Sambandsflokkurin og Fólkaflokkurin samdir, og hetta átti tí at verið eitt gott útgangsstøði at tosa Evropa politikk.

### Møguliga er veruleikin ein annar

Eitt er at blaka pástandir út um framtíðina, og at gita um, hvat ES fer at krevja av føroyingum. Men hvat høvdu Fólkaflokkurin og Jørgen Niclasen sagt, um vit fingu prógvað yvirfyri ES-myndugleikunum, at fiskidagaskipanin er ein veruligur fongur fyri Føroyar? Og hvat um vit fingu sannført limalondini um, at tað loysir seg at brúka okkara skipan, og at fyri hvønn dag sum gongur, tapa ES-limalondini hópin av peningi orsaka av, at tey ikki enn hava sett okkara fiskidagaskipan í gildi hjá teimum?

Heimurin broytist skjótt, og tað er positivt, at umboð Fólkafloksins halda áfram at greiða ES-myndugleikunum frá, hvussu góð fiskidagaskipanin, sum Sambandslandsstýrið setti í gildi í 1996 er, tí málið eigur at vera, at ES tekur okkara skipan til sín. Hetta kundi ført við sær, at limalondini byrjaðu at umsita fiskiríkidømið hvørt sær. Vit sita møguliga við lyklinum til at loysa fiskivinnutrupulleikarnar hjá ES?

### Mugu víðka okkara sjónarring

Tað er avgerandi fyri framtíð Føroya, at vit víðka okkara sjónarring og tora at trína inn í altjóða samfelagið, heldur enn at byrgja okkum inni, soleiðis sum gjørt hevur verið higartil. Orð sum "Eg orki ikki tankan", hoyra ikki heima í hesum sambandinum. Tann einasti mátin vit kunnu gerast klókari uppá, hvørjar ágóðar Føroyar kunnu fáa frá ES, og undir hvørjum treytum, er at tingast beinleiðis við ES. Vit kunnu ikki byggja framtíð Føroya á gitingar.

Um treytirnar, ið ES setir okkum, eru órímiligar, taka vit sjálvandi ikki av tilboðnum. Men eg trúgvi persónliga, at tað fer at bera til at fáa eina góða avtalu í lag við ES.

Vit noyðast longu sum er at lúka nógv av teimum krøvum, sum ES setur til limalondini. Men í verandi støðu hava vit eingi rættindi í ES og fáa tískil heldur ongan ágóða av at ganga undir ES-krøv.

### Mugu orka

Vit skulu sjálvsagt hvørki geva okkara fiskiríkidømi ella oljuríkidømi burtur. Men heldur enn at gita, hvørjar treytir ES fer at seta okkum, eiga vit at tingast við henda felagsskap, fyri at fáa staðfest, hvat ES hevur at bjóða føroyingum. Vit skulu "vita og ikki gita".

Men fyrsta treytin fyri konstruktivum samráðingum er, at vit orka tankan og vilja tosa.

# Arbeiði í summarfrítíðini

SOFUS JOENSEN
Millum Bóla
Kollafirði

Eg havi hugsað í fleiri ár, hví kommunur og landið ikki taka seg saman um eina skipan, har børn, ung og lættari tilkomin kunnu fáa arbeiði í frítíðini, tað veri seg summar- heystella jólafrítíðini. Eg havi nøkur ung fólk í húsi, og tey skriggja eftir arbeiði og gera sanniliga eisini eitt stórt átak at fáa arbeiði, men sum øllum kunnugt, so er tað ikki so lætt longur at fáa arbeiði sum fullkomiliga óroynd/ur, og í okkara føri er bara talan um feriuarbeiði.

Í fjør skipaði Tórshavnar kommuna fyri "ung í arbeiði", og tað skulu teir eisini hava rós fyri! Men hví avmarka tíðarskeiðið hjá hvørjum næmingi til 2 vikur?? (tað fingu vit at vita, og soleiðis var tað) Tað er annað at gera hjá ungum, enn at rudda! Vit kunnu nevna t. d. varðarnar eftir teimum gomlu bygdagøtunum, kráirnar, rossagøtur higar og hagar, fríðking av økjum, sum ikki verða sædd vanliga av meiniga manninum (her hugsi eg kanska serliga um viðarlundina undir hotel Føroyum, ið kundi verið gjørd um til friðarligasta og vakrasta blett í landinum), ella enntá hjálpa bøndrum við at reinsa nýlendi??

Eg eri klárur yvir, at slík arbeiði ikki skulu máa grundarlagið undan nøkrum vinnurekandi ella tímaløntum, men hevur nakar nakrantíð hugsað um at lagað nakrar varðar ella kráir upp ella goldið í dýrar dómar fyri tað? Og

hvør ger rossagøturnar, sum nú er?? Hví ikki gjalda ungum fyri at gera nýggjar og spennandi gøtur og fríðka um tær verðandi? Her verður ikki tosað um smávegis arbeiði, tí hetta kann eisini viðlíkahaldast ár aftaná ár. Enntá sum summarfrítíðararbeiði!!

At reinsað nýlendi ella enntá hegnað, vildi eg mett, at allir bøndur vildu fingið eina avtalu við kommunur og land um, tí samstundis sum bóndin fær arbeiðið gjørt, so fríðkar tað eisini um lendið!

Og hvør skal gjalda, og hvat kostar hetta, spyr helst onkur. Hvat kostar tað, at tey ungu ganga og ikki hava ein "skid" at gera?? Hvat kosta "lediggangsherverkini"?

Latið nú ikki kjakið enda í: "Vit kunnu ikki taka okkum av kráum og varðum, tí tað er líka nógv landið, sum hevur ábyrgdina..." ella "bøndurnir kunnu sgu sjálvir syrgja fyri at reinsa bøin..." og "tað eru bara nakrir fáir, ið fáa ágóðan av rossagøtunum, so tað skal sgu eingin kommuna ella land gjalda fyri.."!!

Tað er IKKI, hvør rindar ella ikki, tað snýr seg um!! Tað snýr seg um at fáa hendurnar úr lummunum hjá teimum ungu - kanska vit sjálv hava størsta feilin í, at hendurnar eru endaðar har!!

Hugsið so eisini um ferðafólkavinnuna. Karmarnar, ið varðar, kráir og rossagøtur skapa. Søga, mentan og í síðsta enda vinningin fyri landið!!

